# Stór MC-framsýning á Hjalla

**Í vikuskiftinum var »Motorsúkkluframsýningin 2007« í Multihúsinum á Hjalla. Talan var um størsta tiltak av sínum slagi í Føroyum. Teir teir tveir dagarnar framsýningin var opin stukku umleið 1.000 fólk inn á gólvið**

MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Áhugin fyri motorsúkklum var stórur á »Motorsúkkluframsýningini 2007«, sum var í Multihúsinum á Hjalla*

At áhugin fyri motorsúkklum er stórur í Føroyum, prógvar Motorsúkkluframsýningin 2007, sum var í Multihúsinum á Hjalla leygardagin 3. og sunnudagin 4. mars. Umleið 1.000 fólk vitjaðu framsýningina.

Framsýninarar vóru: MC-Sølan, AD-Import, Autoshine, Harley Davidson, Norðbil og Føroya-Shell. Har var eitt breitt úrval av ymiskum motorsúkklum í øllum støddum og sniðum. Talan var tó mest um nýggjar motorsúkklur, men eisini fleiri gamlar súkklur vóru við á farmsýningini.

Ætlanin við tiltakinum var fyrst og fremst at motorsúkkluhandlarar kundu vísa fram, úrvalið av motorsúkklum í 2007. Tað er Bilfríðkan, sum eigur Multihúsið á Hjalla.









# Corolla verður til Auris



*Toyota Auris minnir ikki sørt um nýggja Yaris*

**Nú skulu allir Toyota enda við »is«, fyrstur var Yaris, síðan kom Avensis og nú skulu Corolla eita Auris, sum er ein av nýggjheitunum á bilaframsýningini í Genéve**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Eftir meira enn 40 ár á marknaðinum skifta Toyota Corolla nú navn til Toyota Auris, sum er ein av nýggjheitunum á bilaframsýningini í Genéve. Corolla navnið verður tó ikki slept beinanvegin, tí sedan útgávan kemur framvegis at eita Corolla.



*Toyota Auris innan. Bilurin hevur 7 airbag og fekk 5 stjørnur í EuroNCAP krasj-testunum*

*Toyota Auris hatchback*

